

ari stjórnarskipanini hava møguleikar at taka avgerðir um, hvussu leikur skal fara fram eftir at fólkið hevur samtykt okkara stjórnarskipan. Hetta er, sum er, staðfest vit mannagongdini fyri, hvussu gerast skal, um vit loysa frá verandi samveldisskipan – ella tengja okkum nærri samveldinum ella at øðrum skipanum. Við hesum hava vit ikki loyst ósemjuna um loysing ella samband. Tað er ikki endamálið, endamálið er at vit eru samd um, hvussu vit skulu gera, um vit vilja broyta støðuna.

Í uppskotinum til nýggja stjórnarskipan hava vit, fyri at slóða fyri semju um stjórnarskipanina, roynt at sett orð á verandi skipan og á mannagongdir at broyta hana. Hetta merkir at vit samtykkja, at:

- Føroyar eru land
- Føroyar eru tjóð
- Føroyar eru í sáttmálakendum samveldi
- Føroyar kunnu eftir serligari mannagongd taka seg úr ella geva seg í samveldi, tá tjóðin vil tað.

Tað er við vilja, at vit ikki hava nevnt heimastýrislógina í stjórnarskipanini, tí heimastýrisskipani er ikki øðrvísi enn aðrar avtalur, ið lond gera sínámillum. Ein og hvør nýggi stjórnarskipan er úrslit av eini kollvelting, verið hon lítil ella stór, og hon vil ofta stríða móti teirri skipan sum var frammanundan. Í okkara føri er tað ein ógvuliga blíð og sámilig kollvelting, og hon er at føroyingar fyri fyrstu ferð sjálvir skilmarka støðu sína og taka avgerð um at vit, fólkið í Føroyum, hevur ræði á hesum landi. Tí er tað av allarstørsta týdningi, at vit føroyingar ikki ristast á hondunum, men fáa samtykt hesa stjórnarskipan, eftir teirri mannagongd, sum skotið verður upp í sjálvum uppskotinum, tí tá hevur Føroya fólk fyri fyrstu ferð sligið fast, hvør hevur valdið í Føroyum. Hetta vald kunnu vit so nýta til:

- At lata alt verða sum er og ongar broytingar gera
- At fara longur á sjálvstýris- ella fullveldisleið
- At binda okkum nærri í einum samveldi

Hvørki sambandspolitikkur, fullveldispolitikkur ella tað sum liggur ímillum hesi bæði er skert í uppskotinum til Stjórnarskipan Føroya. Fólki kemur sjálvt at avgera hvat tað vil eftir at stjórnarskipanaruppskotið við teimum tillagingum sum tingið er samt um, kemur til.

Vónandi havi eg verið førur fyri at lýsa hetta nóg greitt. Tað næsta verður at greiða frá tí, sum annars stendur í uppskotinum til nýggja stjórnarskipan.

## Ein stutt stjórnarskipan

Ein stjórnarskipan kann verða stutt ella long. Føroyska stjórnarskipanin er millum stytstu í heiminum og er við einans umleið 3600 orðum styttri enn amerikanska og danska stjórnarskipanin, ið annars frammanundan eru millum stytstu og mest virdu stjórnarskipanirnar í heimunum. Broytingarreglan í uppskotinum er ikki av teimum truplastu. Hon krevur avgjørdan meiriluta á tingi, tað vil siga at meirilutin av øllum tingmonnum skulu atkvøða fyri, og síðan fólkaatkvøðu í minsta lagi hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða

Tá skipanin er stutt, yvirskipað og ikki roynir at gera av allar týðandi stríðsspurningar endaliga út frá teirri tíð, sum vit liva í, so eru góð útlit fyri, at Stjórnarskipanin fer at virka væl og ikki kemur at verða broytt ov ofta. Ein stjórnarskipan eigur at vera rímiliga rúm og ikki ov tíðarbundin í sínum orðalagi, hon skal kunna laga seg eftir samfelagnum.

## Innihaldið

Hvat er so innihaldið í stjórnarskipanini. Tað ber til at býta flestu stjórnarskipanir upp í ymsar tættir:

- Ásetingar um sjálvsfatan og samleika hjá landi og tjóð
- Ásetingar um viðurskifti landsins úteftir og møguligt sundurbýti inneftir
- Ásetingar um stýri, hvørjar stovnar eru, hvat vald teirra hava, og hvussu teir fremja tað
- Ásetingar um rættindi fólksins og aðrar avmarkingar av almenna valdinum
- Ásetingar um, hvussu skipanin sjálv kann verða broytt

Uppskotið um Stjórnarskipan hevur øll hesi eyðkenni. Sum grundleggjandi lóg ella skipan er uppskotið tí meiri fullfiggjað enn nakað skjal, føroyingar higartil hava samtykt. Verandi stýrisskipanarlóg hevur bert ásetingar um stýri landsins og fyri tað mesta ásetinger umsettar úr donskum. Uppskotið um Stjórnarskipan er ein endurskoða stýrisskipan, sum harumframt hevur ásetingar um tjóðskaparliga sjálvsfatan, samveldisstøðu og mannarættindi.

Lat meg í stuttum greiða frá, hvussu stjórnarskipanin er skipað. Hon er býtt upp í preambul ella formæli og tríggjar partar. Fyrsti partur er *tann stutta stjórnarskipanin*, tí har verður tikið saman um alla stjórnarskipanina og her eru tað sjálvar meginreglurnar, sum meira verður gjørt burtur úr seinni í skipanini, koma fram. Annar partur er um rættindi og lýsir tey rættindi fólkið hevur. Rættindi eru antin tað vald, ið landsins almennu stovnar ikki hava, ella tær avmarkingar í valdinum, sum stovnarnir mugu virða. Føroyar eru bundnar av ásetingum í altjóða sáttmálum, men hóast tað, verður hildið neyðugt at orða rættindini fólksins nágreiniliga í stjórnarskipanini, bæði til tess at tryggja avgerðarheimild løgtingsins, at tryggja serlig føroysk rættindi og fyri at tryggja almennu tilvitanina um rættindini.

Triði partur er um stýrisskipanina og inniheldur ásetingar um vøldini øll og viðurskiftini hjá teimum hvørjum mótvegis øðrum. Í øllum øllum eldri stjórnarskipanum hevur hesin parturin um sjálva stýrisskipanina hildin at verða mest týðandi í eini stjórnarskipan og hesin parturin fyllir ofta mest í skipanini, men í nýggjari stjórnarskipanum eru onnur viðurskifti uppi í fyrst og fremst mannarættindi. Soleiðis er tað eisini í okkara egna stjórnarskipanaruppskoti.

Fyrstur av øllum í stjórnarskipanini er preambulin. Fyri at tann stjórnarskipan sum er skotin upp verður tann felags grund, sum allir føroyingar vilja standa á og taka undir við, hava vit valt at binda tráðin aftur í søgu okkara og tí sum er hent upp gjøgnum tíðina. Samleikin hjá einum fólki kann ikki slítast leysur frá søguni. Í stjórnarskipanaruppskotinum hava vit mett, at einast við at minnast og virða tað sum undan er fari ber til at skapa eitt grundleggjandi skjal, ið fólki sær seg og tekur undir við. Preambulin tekur støði í teimum søguligu fortreytunum sum lynna undir teirri nýggju skipan sum nú verður lýst og sum fólki skal gera til sína.

## Mál og kyn

Málið hevur sjálvandi nógv at siga í eini stjórnarskipan. Tað fyrsta uppskoti hevði eitt fornari málsnið enn tað uppskot sum varð lagt fram 18. desember 2007. Tað var nevndin ikki samd um at hava. Onkur heldur at uppskotið við hesum hevur mist nakað av tí serliga karakteri, sum tað hevði upprunaliga, nú málið er vorði meira gerandisligt. Sjálvur haldi eg at málið er gott, men tað er altíð so, at okkurt kann gerast betri, og tað vóni eg eisini kemur at henda í viðgerðini á tingi.

Fyri nøkrum árum síðani var eg formaður í eini nevnd, sum skuldi evaluera alla universitetsundirvísing í fakinum etnologi í Svøríki. Í hesum sambandi var tað álagt okkum at minnast til *könnsperspektivet*. Tað, at munur ikki skuldi gerast á manni og kvinnu, skuldi javnt og samt verða havt í huganum. Spurningurin er so hvussu er við *kynjarhorninum* í uppskotinum til Stjórnarskipan Føroya. Eitt er at bæði stjórnarskipan og grundlóg eru kvennkyn, men vit hava ikki beinleiðis nevnt kynini í skipanini, men í § 19 stendur

- Øll fólk eru javnsett uttan mun til eyðkenni ella frábregði
- Tingið kann samtykkja at rætta tann mun, ið áður hevur verið gjørdur á fólki vegna eyðkenni ella frábregði.
- Eingi forrættindi kunnu verða varandi.

Hetta haldi eg er ein sera rúmlig orðing, sum eisini gevur møguleika til at rætta upp mun, sum hevur verið gjørdur á fólki, tað verið seg við løgskipan ella í praksis, tí tað er ikki bert lóg í víðastu merking, sum ger mun á fólki, men tað kunnu vit sjálvi gera sambært sið og siðvenju. Ikki minst tá vit skulu seta kross á blað. Tað er t.d. eingin lóg sum forðar fyri at fleiri kvinnur verða valdar á ting, orsøkin liggur aðrastaðni, men tað forðar ikki fyri at tingið ikki kann rætta hetta, so við fáa somu nyttu burtur úr báðum kynunum.

Ein spurningur. sum ofta er komin upp er spurningurin um. hvussu vit skulu kalla tey fólk sum sita í landsstýrinum. Sum er, er tað løgmaður og landsstýrismenn. Onkur spyr hví ikki lata kyni avgera, um tað verður landsstýrismaður ella landsstýriskona. Tað hevði givið meining. Tað týska málið nýtir t.d endingina ir tá talan er um kvennkyni, har Angela Merkel kallast *Bundeskanzlerin* í mun til Gerhard Schröder, sum var *Bundeskansler*. Onkur annar heldur at vit skuldu brúka orðið løgfólk ella landsstýrisfólk. Tað gevur meining í ávísum høpi, men ikki í øllum og virkar eitt sindur løgið málsliga, men tað er kanska bert ein vanasak. Her hava vit í nevndini ikki verði serliga kollveltingarsinnað, men hildið okkum til tað sum er og tey heiti, sum higartil vanliga eru brúkt í føroyska málinum. Hin vegin hava vit av álvara ætlað at fara burtur frá heimastýrishugtøkunum og í staðin skjóta upp at nýta forsætisráðharri um løgmann og ráðharri um hini t.d. uttanríkisráðharri ella fíggjarmálaráðharri og so framvegis. Heitið løgmaður kundi løgtingsformaðurin so fingið, tað hevði eisini samsvara gamla siðvenju.

Hetta kjak hava vit kortini ikki av álvara tikið upp í stjórnarskipanarevndini, men eg ivist í um vit høvdu komið til nakra semju, men fyri tað ger uppskotið til Stjórnarskipan Føroya ikki mun á manni ella kvinnu, sjálvt innløgurættindini eru vend móti báðum kynunum. Fyri ikki at taka breyði úr munnunum á Margretu Nónklett og Marnu Jacobsen, sum koma aftaná meg í dag, vil eg ikki koma nærri inn á hesar spurningar, men lata tær siga tað sum sigast skal.

## Endi

Hvørt hús í Føroyum hevur fingið eitt eintak av uppskotinum til stjórnarskipan og sjálvt álitið liggur á netinum og fæst sum bók við at venda sær til løgmannsskrivstovuna. Tað er mín vón at øll tann arbeiðstíðin, sum er løgd niður í áliti ikki fer til spillis, tí er eitt og hvørt høvi har skift verður orð um stjórnarskipanina kærkomið. So kunnu vit sjálvandi diskutera, um vit skulu velja løgmann beinleiðis, um tað skal ein fólkaatkvøða til fyri at einskilja kongsjørðina ella ikki, um vit skulu hava ein Búskapargrunn, um vit skulu hava deyðarevsing, um vit skulu hava innløgurættindi ella um tað er sagt ov nógv, tá tað stendur at

- Børn eiga at verða uppfostrað í einum familjuumhvørvi við gleði, kærleika og samljóði, har tað, ið er best fyri barnið, skal vera fremsta atlit.

Ein breið viðgerð og orðaskifti av stjórnarskipanini í fólki okkara ger, at samstundis sum fólk fáa størri fatan og betri innlit í hvat tað snýr seg um, so verða tey eisini sjóðað saman við hesi skipan og tess meira hon verður kanna og eftirkannað, tess mera verður hon partur av okkara hugaheimi.

Tað er mín vón at tað sum stendur í formælinum, nevniliga*: Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundarlag undir stýri okkara og fyriskipanin, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað* verður til veruleika og eg vil takka Kvinnusamskipanini fyri at evnið Stjórnarskipanin verður tikið upp á kvinnudegnum.